# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Føroyar – Danmark og ES

Ein spurningur, sum javnan er frammi í politiska og samfelagsliga kjakinum her heima, er í hvønn mun støða okkara í Ríkisfelagsskapinum broytist, tá danski limaskapur í ES broytist ella verður ávirkaður av broytingum í ES. Kunnu og skulu vit bara uttan víðari góðtaka at fylgja teimum broytingum, sum við tíðini fara fram millum einstøku ES limalondini og so sjálva ES háborgina í Brussel! Ber tað í heila tikið til at lata Danmark stýra okkara uttanríkispolitikki, tá sama Danmark letur upp í hendurnar á ES at stýra sama uttanríkispolitikki!

Spurningurin um eina ES grundlóg, har lagt verður upp til at skipa ES á sama hátt sum sambandsríkið USA, har ymsu statirnir lata upp í hendurnar á eini stjórn eitt nú uttanríkispolitikkin, hevur verið eitt av stóru samtaluevnunum í Europa í mong ár. Ì fjør fekk henda tilgongdin skot fyri bógvin, tá fleiri lond við fólkaatkvøðu kolldømdu ætlanina um eina ES grundlóg. Nú eru londini samd um at seta í verk eina traktat, sum hevur við sær broytingar í sjálvari stjórnarskipanini. Í uppskotinum, sum ætlanin er at fremja nú, eru m.a. broytingar í atkvøðubýtinum og møguleikunum at seta í verk meirilutaavgerðir, umframt at felags uttanríkispolitikkur hjá ES verður styrktur.

Alt hetta hevur fingið Høgna Hoydal, fólkatingsmann at rópa varskó og hevur hann sett fram sera relevantan og áhugaverdan fyrispurning til forsætisráðharran. Hann spyr nevniliga, hvørjar avleiðingar nýggj ES-stjórnarskipan fær fyri Føroyar? Tá Danmark leggur fleiri avgerðir og meira vald til ES á teimum málsøkjum, sum Danmark vegna Føroyar hevur valdið á, hvørja avleiðing fær tað fyri Føroyar spyr fólkatingsmaðurin. Forsætisráðharrin verður biðin um at útgreina málið og veita trygd fyri, at føroysk og grønlendsk mál umvegis Danmark ikki verða løgd til ES at umsita.

Hetta er greið tala og avgjørt nakað, sum eisini føroyskir myndugleikar eiga at geva gætur. Hvat sigur løgmaður, sum er ovasti leiðari okkara mótvegis umheiminum! Vónandi hava tey í Tinganesi noterað sær spurningin hjá Hoydal til Fogh, og vónandi tekur løgmaður hetta mál í størsta álvara og ger Føroya fólki greitt, hvat liggur í kortunum, nú ES skal til at átaka sær uppgávur, sum í dag verða røktar av Danmark.

Nú val er í nánd er tað er lítil ivi um, at júst hetta málið fer at verða raðfest høgt. Og tað skal tað sjálvsagt eisini. Vónandi fer forsætismálaráðharrin at gera sær ómak at svara spurninginum væl og virðiliga. Eisini kundi tað verið áhugavert at hoyrt, hvat okkara egnu serfrøðingar á økinum hava at siga. Vit mugu bara ganga út frá, at hetta eisini eru mál, sum uttanríkisdeildin í Tinganesi hevur frammaliga á sínum lista.

**Sosialurin**

## Vit kunnu ikki steðga toskafiskiskapinum!

**VINJARD JOHANSEN**
varamaður á løgtingi



Fyrst velir man at taka fiskidagar, síðani loyvir man ov nógvum førum inn í bólkarnar, og um hetta ikki var ovboðið, verður nú tosað um at steðga toskafiskiskapinum!

Fiskivinnan er sum kunnugt okkara høvuðsvinna, og okkara einasta bein at standa á sum eitt samfelag. Hetta sæst púra klárt á okkara útflutningstølum, sum vísa á at heili 95% av tí ið verður útflutt, er fiskur.

Tá ið landsstýrismaðurin Bjørn Kalsø legði uppskotið fram um vinnuligan fiskiskap ólavsøkudag 2006, vildi landsstýrismaðurin halda seg til ásetingarnar í lóguni, at varðveita tilfeingið, og at gagnýta hetta á skilagóðan hátt, bæði lívfrøðiliga og búskaparliga.

Vit kunnu skjótt koma ásamt um at tað er sera umráðandi at vit gagnýta okkara tilfeingið á best møguligan hátt, og at tað verður hugsað bæði lívfrøðiliga og búskaparliga. Men hóast hetta, kann eg ikki vera samdur við landsstýrismanninum, tá hann enn einaferð vil minka um fiskidagatalið.

Hetta kemur av tí, at eg meti at tað fer at ávirka búðskapin ov nógv, tá hugsa verður um at skipini missa fleiri og fleiri dagar.

Ígjøgnum tey seinastu árini hava vit sæð talið á fiskidøgum minka støðugt, men harafturímóti, bólkarnar vaksa. Fyri at taka eitt dømi, kunna vit nevna bólk 3, ið eru línuskip yvir 110 tons.

Her hevur man sæð, at skip eru kroyst inn í bólkin við loyvum frá landsstýrismanninum, uttan at tað hevur verið hugsa, um ávirkanina hetta hevur við sær. Í bólki 3, eru pláss fyri 19 ella 20 førum, men talið á førum er komi heilt upp á 26.

Tað mátti ikki verið so torført at sæð, at hevur man eitt stykkið til tveir seyðir, ber ikki til at seta heilar 10 seyðir inn á stykkið, tí so er ikki matur til allar, og teir doyggja burturav. Hetta er júst tað man kann kom út fyri, við at taka fleiri fiskidagar burtur.

Enn hava skip kunna keypt fiskidagar, og eg vil vera við, at um hetta ikki hevði verið ein møguleiki, so stóð nokk ikki væl til hjá nógvum skipum. Tað má verða skil á døgum í mun til tey før man loyvir inn í bólkin. Nú er tíbetur steðga við at geva fleiri skipum loyvi at koma í bólkin. Í seinastuni hevur enntá verið tosað um at minka bólkarnar aftur, men hetta fer at ber illa til tá ið man er komin út í hesa skipan. Hetta man nokk verða røddir sum vilja út aftur í upphøggingarstuðulsskipanina, ið var fyrr.

Næsta stigið, eftir tilmælið frá ICES, er nú at steðga øllum toskafiskiskapið, tí man vil vera við at nøgdin av toski er minkað. Hetta er júst tað sama vit hoyrdu og sóðu í 90-unum, har felagsskapir sum ICES, vildu mest sum hava allan fiskiskap steðgaðan, av ovurfisking. Men minnist eg rætt, gingu tað ikki meira enn 3 ár til stovnarnir vórðu so stórir sum ongantíð fyrr. Tá stóðu mest sum allir felagskapir spyrjandi, tí teir visti ikki hvussu hetta kundi bera til.

Skil meg rætt, hervið verður ikki mælt til at vit skulu ovurfiska, nei, tað eg vil siga við hesum er at tað sjálvandi ræður um at fara væl við náttúruni, men samstundis við atliti til búskapin, ið er tengdur at fiskiskapi.

Fiskiskapurin er okkara drívmegið, og uttan hesa drívmegið kunnu hinar tænastunar ikki virka 100%, tí at fiskivinnan er okkara størsta inntøka.

Í Dagur & Viku, úttalaði landsbankastjórin seg um at man skuldi steðga øllum toskafiskiskapið fyribils.

Eg meti tað vera sera óheppið at úttala seg soleiðis, tá man sum landsbankastjóri, veit líka væl sum øll onnur, at vit hava 26 skip við manning uppá 14 í línuflotanum, íalt 394 familjur, og harafturat allan útróðrarflotan. So talan er um nógv húskir tilsamans í Føroyum sum fara at missa inntøku um hetta ið er umtala verður sett í verk. Hetta fer heilt víst at merkjast í búðskapinum, tá øll hesi fara at banka uppá hjá ALS um hjálp.

Eg farið tí at tilmæla at lata toskafiskaríði ganga sína gongd, og at lata skipini eiga dagarnar teir hava fingið sum teir ikki brúka, enn at teir skulla missa teir.

Eg haldi at nú er tíðin komin til at vit muga fáa skil á hvat viðvíkir fiskiskæpinum undir Føroyum.

## Spælistaðið er á veg Teitur

**HILDUR EYÐUNSDÓTTIR**
Forkvinna í mentamálevnd Tórshavnar býráðs



Góði Teitur. Tað er gott at tú tekur umstøðurnar hjá føroyskum tónleikarum og føroyska tónleikapallinum upp. Vit eru sera samd bæði. Hóast tað er ríkandi fyri okkara býarlív, so er tað als ikki nøktandi fyri tónleikin bert at hava dansistøðini og barrir sum pall.

Men eg havi eini gleðiboð hesum viðvíkjandi. Tórshavnar býráð er farið í holt við at fyrireika Gamla reinsaríðið til spælistað. Í løtuni verður húsið høvuðsumvælt uttan, og samstundis verður arbeitt við eini heildarætlan fyri reinsaríið og økið rundan um við smáu bygningunum og túnunum í millum. Hetta hevur mentamálanevndin samtykt.

Ætlanin er, at fáa eitt heildarkonsept við spælistaði og venjingarhølum, og øðrum kreativum virksemi til t.d. myndlist. Og túnini rundanum skulu gerast hugnalig so at tað eisini ber til at vera uttandura tá ið veðrið loyvir tí.

Hetta er alt í trá við tankan um Tórsgøtu sum mentanargøtu við fjølbroyttum virksemi.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.